

# FRÁ ÆRLIGARI KAPITALISMU **TIL SYNDUGT KASINOSPÆL**

KAPITALISMAN HEVUR **VÍST** SEG SUM EINA **ÓRÆTTVÍSA**, MISKUNNARLEYSA OG ÓNDSINNAÐA **HUGSJÓN**, OG HON SKULDI VERIÐ **STEÐGAÐ**, SO VERULIGT **FÓLKARÆÐI** KUNDI VERIÐ SETT Í **HÁSÆTI** AFTUR, ER **BOÐSKAPURIN** HJÁ **MICHAEL MOORE** Í FILMINUM **»CAPITALISM - A LOVE STORY«** FRÁ 2009. **KAPITALISTISKA** SKIPANIN, SUM RENDI SEG FASTA Í 2008, RÆNDI **700 MILLIARDIR** DOLLARAR FRÁ **AMERIKANSKA** FÓLKINUM TVEIR **MÁNAÐIR**, ÁÐRENN **BARACK OBAMA** VANN Á REPUBLIKANARUNUM Á **FORSETAVALINUM**. FYRI HETTA **RÁNIÐ** ÁTTU TEY SEKU AT VERIÐ SETT **FØST**, HELDUR **MICHAEL MOORE**



**FILMUR**
Uni Arge
ua@sosialurin.fo

»Hetta er ein døpur tíð fyri amerikanska búskapin. Serfrøðingar siga, at um Kongressin ikki leggur uppí, kann USA enda í fíggjarligum ruðuleika. Fleiri bankar kunnu fara á heysin, eisini bankar í tínum nærumhvørvi. Kursirnir fara at falla, og tín pensjón verður minni verd. Virðið á tínum húsum fer at falla, og vit fara at síggja fleiri húsagangir. Eigur tú eina fyritøku, kann gerast verri at fáa lán, og truplari verður eisini at fáa lestrarlán. Milliónir kunnu missa arbeiðið.«

Við hesum orðum royndi George Bush í august 2008 at sannføra amerikanska fólkið um, at búskaparliga ólukkan hjá USA nærum var vís. Endamálið var ikki alfaðirliga at greiða frá truplu støðuni í landinum, men at skapa undirtøku fyri, at stóru amerikonsku fíggjarfyritøkurnar skuldu sleppa at ræna 700 milliardir dollarar úr amerikanska statskassanum. Vápnið hjá George Bush var at spjaða ræðslu millum fólk, og átakið eydnaðist. 700 milliardir dollarar vórðu stutt eftir sprændar í amerikanska fíggjarkervið.

Hetta er ið hvussu er útleggingin hjá amerikanska filmsframleiðaranum, Michael Moore, í filminum »Capitalism – a love story« frá 2009. Michael Moore hevur ongantíð krógvað, at hann hevur verið ímóti øllum tí, sum George Bush og hansara partamenn í republikanska flokkinum hava staðið fyri, og í filminum ger hann upp við kapitalismuna sum eina fyrilitaleysa hugsjón, ið fjálgar um tey fáu og tekur arbeiðini frá milliónum av hampafólkum og rekur tey frá húsi og heimi.

### Óheiðurliga hugsjónin

Filmurin byrjar við, at ikki færri enn seks politibilar koma á gátt hjá eini heilt vanligari familju í USA og biðja hana sleppa sær á dyr, tí húsini skulu latast øðrum. Fólkini vilja av prinsipiellum orsøkum ikki lata upp, tí tey vilja hava løgregluna at bróta sær veg inn í húsið. Og tað ger løgreglan so. Út má familjan at finna sær tak yvir høvdið onkra aðrastaðni, tí hon eins og so mangar aðrar familjur læt seg lokka at taka tey sonevndu subprime-lánini, ið tóktust so tølandi, men gjørdust ómøgulig at gjalda aftur.

Kapitalistarnir reyvrenna altíð tann minni menta, er boðskapurin hjá Michael Moore, og í filminum ger hann upp við ta afturvendandi hálovingina av tí sonevnda frælsa fyritaksseminum, ið kapitalisman altíð hevur verið sett í samband við. Frælsa fyritakssemið kundi væl lýsast sum eitt positivt hugtak, sigur ein av keldunum hjá Michael Moore, tá talan var um lítlar býir, har hvør maður fekk sær ein lítlan handil, og kundarnir flokkaðust um tann handilin, ið hevði bestu vørurnar. Tað var ærlig kapitalisma.

Men kapitalisman í dag er langt frá so heiðurlig, og teir størstu kapitalistarnir framleiða ikki á ærligan hátt tað, sum fólk vilja hava. Teir spæla vandamikil spøl við milliardum, og tá spølini miseydnast, skaða tey øll, ikki minst hartarbeiðandi húsaeigarar. Teir størstu aktørarnir í hesum meldrinum, tær stóru fíggjarfyritøkurnar, ið prædika um júst frælsa fyritakssemið, falla ikki, tá tær ikki longur kunnu standa, eins og liberalisman fyriskrivar. Tær koma rínandi og hvínandi til tað almenna og biðja um at verða bjargaðar.

### Stýrið eitur plutonomi

Michael Moore er sjálvur úr býnum Flint í Michigan. Hann brúkar býin sum dømi um, hvussu kapitalisman er miseydnað kring alt landið, tí har í býnum er tað mesta farið á heysin, og fólk eru rikin úr sínum húsum. Hann fer á gátt hjá gamla presti sínum at spyrja, hvat prestur heldur um kapitalismuna í dag. Hon er synd, sigur hann, tí hon virkar ímóti áhugamálunum hjá felagsskapinum, hon virkar ímóti miskunnsemi, og hon gongur ímóti øllum rættvísi. Á radikalan hátt er hon rætt og slætt ónd, sigur presturin.

Michael Moore heldur fram og sigur, at USA er ikki nakað demokrati, men eitt plutonomi, sum merkir, at ein everska lítil minniluti stýrir øllum búskapinum og tí hevur valdið í landinum. Fyri at undirbyggja hetta vísir hann á eitt kunningarskriv, sum Citibank sendi sínum ríkastu kundum. Í skrivinum fegnaðist bankin um, at 1 prosent av fólkinum, tann ríkasti parturin, stýrir USA. Einasta hóttanin ímóti hesum veruleika, skrivaði Citibank, var, at restin av fólkinum hevur eina atkvøðu í part og kann seta fram krøv um, at ríkidømið verður býtt javnari.

Michael Moore staðfestir, at meðan fólkið hevur 99 prosent av atkvøðunum, og stórkapitalistarnir hava alt ríkidømið, hevur eydnast kapitalistunum at fáa tey 99 prosentini at fagna kapitalismuni sum hugsjón. Ja, teir hava við propagandu spent sjálvan Jesus fyri sín vogn og kallað kapitalismuna gudgivna, men tað er hon sanniliga ikki, sigur Michael Moore. Segði Jesus kanska við tann sjúka, at hann vildi ikki grøða hann, tí tann sjúki skuldi sjálvur gjalda sína sjúkratrygging? Bað Jesus tann svanga eta seg mettan av frælsum fyritakssemi? Nei, hann var miskunnsamari enn so, sigur Michael Moore speiskliga.

### USA sum ein fyritøka

Fyrr í tíðini var kortini als ikki so galið í USA, vísir hann á. Pápin í húsinum arbeiddi, húsini vórðu goldin, triðja hvørt ár fingu familjurnar nýggjan bil, tær ferðaðust javnan, børnini gingu í skúla, og fólk høvdu fría sjúkratrygging og tannlækna. Mamman kundi enntá ganga heima, so fræg vóru korini. Samstundis varð landið útbygt við vegum, brúm og øðrum hentleikum, og landið hevði haraftrat ráð at senda raskar menn heilt upp á mánan. Men so kom slangan í paradís, og slangan var poli-